Reykjavík 14. mars 2012

# Frásøgn: Feðgar í Reykjavík Open

Reykjavík Open varð hildin í døgunum 6. – 13. mars. Tvey føroysk umboð vóru við: Andrias Ziska og Helgi Dam Ziska. Kappingin, sum hevur verið í støðugum vøkstri seinastu árini, hevði annars methøga luttøku í ár við 200 telvarum. Ein orsøk til hetta mundi vera, at eftirstundað nøvn sum italska stórtalentið, GM Fabiano Caruana (2767), og kvinnuligi heimsmeistarin, kinesiska GM Hou Yifan (2639), vóru millum luttakararnar. Ein onnur orsøk var helst, at kappingin varð hildin í glæsilga nýggja konserthúsinum, Hørpuni. Flest øll munnu vera á einum máli um, at tað er ein flottur bygningur, men almenna fatanin millum telvararnar var, at Harpan helst hóskar seg betur til konsertir enn talvkappingar, tí tað hoyrdist oftari enn so larmur frá orkesturvenjingum, vindi og oompah-oompah elektrotónleiki niður í spælihølið. Fyrireikararnir lovaðu tó at bøta um hetta til næsta ár.

Føroyingarnir løgdu væl út: Helgi vann ein tryggan sigur, og Andrias telvaði væl upp ímóti týskum IM'ara við 2410 í rating. Týskarin tók so líðandi yvir, men Andrias vísti honum ov nógva virðing við at leggja kongin í einari støðu, sum lovaði fyri góðum remismøguleikum.

Í 2. umfari varð tað til tveir javnleikir. Helgi trýsti, men megnaði ikki at knógva seiga kanadiumanninum, FM Michael Dougherty, við 2200 í rating. Andrias var hinvegin heppin at sleppa við javnleiki ímóti evnaríku íslendsku gentuni, Nansy Davidsdóttir (1379), sum herfyri telvaði við í yngsta bólkinum til NM fyri ungdóm. Gentan vísti gott álopsspæl, men hevði tíbetur ikki neyðuga teknikkin í rókaendatalvinum.

Í 3. umfari fekk Andrias góðan sigur til høldar ímóti hollendingi við 2050 í rating. Eg telvaði sjálvur eitt spennandi talv ímóti 12 ára gomlum indiskum talenti:

## Ziska,Helgi Dam (2456) - Arjun,Bharat (2210)

**1.e4 c6 2.d4 d5 3.e5 c5 4.dxc5 Nc6 5.Nf3 Bg4 6.c3** Diagram



Eg hevði fyrireikað henda variantin leysliga undan talvinum. Nú skal svartur ansa sær fyri einari tematiskari fellu: **6...e6** [6...Nxe5?? 7.Nxe5! Bxd1 8.Bb5+ og vinnur.] **7.b4 Bxf3 8.Qxf3 Nxe5 9.Bb5+ Nc6 10.0–0** Diagram



Eg hevði hesa støðuna á borðinum (tvs. á telduni) undan talvinum. Ætlanin hjá hvítum er sjálvandi at spæla upp á finnurnar á frúgvasíðuni. Tað er tó trupult at trýsta tær longur fram, tí hvør finnuleikur skapar veikleikar. Um hvítur t.d. leikar b5 seinni, verður c5-finnan veik, og um hann leikar c4, skal hann ansa eftir finnuni á b4. Men hóast finnurnar eru immobilar, avmarka tær svartan. Hvítur hevur bispaparið, sum kann verða ein fyrimunur seinni í talvinum, men svartur hevur hinvegin tvær miðfinnur, sum eisini viga tungt. Støðan er nøkunlunda í javnvág. **10...Be7 11.Bf4!** Forðar ...Fc7 og ...e5. **11...Nf6 12.Nd2 0–0 13.Rfe1** Diagram



Aftur nú fyri at yvirverja e5-puntin. Tað er týdningarmikið at forða svørtum í at fáa miðfinnurnar á rull. **13...a6** [Her var 13...Rc8 møguliga neyvari. Ætlanin er tann sama sum í talvinum við ...b6, men svartur vónar at vinna eitt tempo upp á bispin á b5 eftir cxb6 og ...Fxb6.] **14.Ba4 Rc8 15.a3!** Tekur atlit til ætlanina hjá svørtum við at yvirverja finnuna á b4. **15...b6 16.cxb6 Qxb6 17.c4** Diagram



Ætlanin er skapa eina frífinnu á c-linjuni, um svartur loyvir tí. Um hann hinvegin tekur á c4, opnast støðan, og tað er til fyrimuns fyri hvítan, sum hevur bispaparið.**17...a5** Indarin ger rætt í at ikki taka á c4. **18.c5 Qb7 19.Bxc6 Qxc6 20.Rab1 a4?** Diagram



Svartur vil forða riddaranum í at sleppa upp á b3, men hesin leikurin stabiliserar samstundis hvítu finnurnar á frúgvasíðuni. **21.Rbd1** Við ætlanini Rib1-c3. **21...Rfd8 22.Nb1 Ne4 23.Qd3 h6 24.f3 Nf6** Diagram



Her hevði eg upprunaliga ætlað at spælt Ric3, men nú sá eg mótleikin ...Bxc5! Eg gjørdi av, at best mundi vera at flyta kongin, men kom í eina tvístøðu: skal kongurin út á f1 ella inn á h1? F1 var freistandi, tí ein ætlan hjá mær í hesari støðuni var at spæla Ric3 og Fb5 fyri at býta frúnnar upp, og á f1 hevði kongurin tá verið meira aktivur í endatalvinum. Men svartur kann lættliga sleppa undan frúgvauppbýtinum, og tá kann kongurin skjótt koma í vanda á f1. Í slíkum tvístøðum er tað næstan altíð best at flyta kongin úr vandanum, hóast tað tá tekur longri tíð at fáa hann við í endatalvinum. **25.Kh1** [Fritz heldur tó ikki nógv um leikin. Hann viðmælir 25.Be5 við greiðum fyrimuni til hvítan.] **25...d4 26.Be5 Rd5?** Missur finnu fyri einki. [26...Nd7 var frægari. Her var ætlanin hjá mær nú at fáa riddaran niðan á c4 við 27.Nd2] **27.Qc4** Diagram



**27...Rcd8** [27...Nd7 28.Bxd4 Rd8 29.Nc3 Nb6? 30.Nxd5! var ein stuttligur variantur, eg roknaði.] **28.Rxd4 Rxd4 29.Bxd4 Qd7 30.Bg1** Diagram



Svartur hevur onga kompensatión. Finnurnar á frúgvasíðuni avgera talvið. **30...Qd3 31.Qc1** [31.Qxd3 var møguliga lættari, men eg var bangin fyri, at hann fór at fáa mótspæl, av tí at riddarin á b1 er trupul at fáa við.] **31...Nd5 32.Rd1 Qb3 33.Nd2 Qa2 34.Ne4** Diagram



**34...Kh7 35.Nc3 Nxc3 36.Rxd8 Bxd8 37.Qxc3 Qb1** Diagram



Ger tað lættari. Nú fær hvítur býtt frúnnar upp. **38.Qd4! Be7 39.Qe4+ Qxe4 40.fxe4 e5 41.c6 Bxb4** Diagram



Her gjørdi mótstøðumaðurin nakað ódámligt: hann tók finnuna, men setti bispin mitt í millum puntarnar b4 og c4. Ætlanin var óivað at fáa meg at nerta við bispin fyri síðani at siga "nortin maður" á indiskum og noyða meg at taka hann við finnuni. Svartur fær tá frúgv upp, men støðan er kortini fullkomiliga vunnin. Fyri ikki at eftirlíka honum leikti eg ístaðin: **42.c7**

**1–0**

Í 4. umfari væntaði okkum báðum sterk mótstøða. Andrias valdi skeiva ætlan í kongaindaranum og fekk ongantíð fótin fyri seg ímóti sama kanadiumanninum, sum eg leikti javnt ímóti í 2. umfari. Eg kom sjálvur illa frá byrjan ímóti GM Kryvoruchko (2666) og mátti lata eina finnu tíðliga í talvinum. Mótstøðumaðurin fann tó ikki bestu ætlanina, og eftir 27. leikir kom henda støðan á borðið:

# Kryvoruchko,Yuriy (2666) - Ziska,Helgi Dam (2456)



Tað kann vera lítil ivi um, at hvítur enn hevur meira ella minni avgerandi fyrimun, men støðan spælir seg ikki sjálv. Hetta talvið er eitt dømi um, at tað loysir seg at stríðast.

**27...Rdf8!** Ein góður praktiskur leikur, sum setir eina lítla fellu. **28.Rf3!** Hvítur sær ætlanina. [28.fxe5? Rhg8+ 29.Kh1 Bxe5 30.Nxe5+ Nxe5 var tankin handan 27...Rdf8. Hvítur kann ikki taka riddaran á e5 vegna mát á f1, so svartur hevur gott mótspæl (Fritzurin sigur enn tá, at støðan er jøvn).] **28...Rfg8+** Diagram



**29.Kf1!** Aftur tann rætti leikurin. [Eftir 29.Kh1 hevði eg ætlað 29...Bh4 30.Re2 Rg2! 31.Rxg2 hxg2+ 32.Kxg2 e4 við mótspæli.; 29.Rg3?? Bh4 gongur sjálvsagt ikki.] **29...Rh5** Diagram



**30.fxe5?!** Svartur fær nú aktivt spæl. [30.Re2 var ein góður profylaktiskur leikur, sum verjur ímóti ...Rg2. Svartur kann ikki betra sína støðu, og hvítur hevur tí avgerandi fyrimun.] **30...Nxe5** Diagram



**31.Rxf6 Nxc4 32.Bf4 Rg2 33.Re2 Ne3+!** Diagram



Ein leikur, eg var sera fegin um at finna - og helst eisini tann leikurin, sum mótstøðumaðurin hevði yvirsæð. **34.Bxe3 dxe3 35.Rf7+** [Tankin handan 32...Ne3+ kemur til sjóndar í variantinum 35.Rxg2 hxg2+ 36.Kxg2 Rxh2+!]



**35...Kd8** [35...Kd6 var eisini ein møguleiki, men eg valdi leikin frá orsakað av 36.Rf3. Nú riggar 36...Rd5 ikki, av tí at kongurin stendur á d6: 37.Rxh3 Rxe2 38.Kxe2 Rd2+ 39.Kxe3 Rxc2 40.Rh6+. Finnan á a6 rýkur, og hvítur vinnur endatalvið. Samanber henda variantin við variantin til næsta leik hjá hvítum.] **36.Rxe3?** Blakar fyrimunin fyri borð. [36.Rf3 var ein betri roynd. Eg hevði tá ætlað 36...Rd5 37.Rxh3 Rxe2 38.Kxe2 Rd2+ 39.Kxe3 Rxc2




Analysudiagram

við hampiligum remismøguleikum. Svartur vinnur b-finnuna, og tað verður trupult hjá hvítum at skumpa h-finnuna niðan brekkuna og samstundis verja a-finnuna.] Aftur til talvið: **36...Rxh2** Støðan er nú púra jøvn. Diagram




**37.Rg3 Ke8 38.Rc7 Kf8** Diagram



**39.Rd3 Ke8 40.Rg3 Kf8 41.Rf3+ Ke8 42.Rg3** Um hvítur spælir víðari, vágar hann at tapa. Svartur kravdi nú remis við leikendurtøku.

½–½

5. og 6. umfar vóru góð hjá eldra Ziska, sum basti enn einum 2050-manni og vann uttan talv ímóti einum á 2150, men ikki nøktandi hjá yngra. Hóast fyrimun fyrr í talvinum var eg heppin at sleppa við javnleiki ímóti 14 ára gamla norðmanninum, Kristian Stuvik Holm (2290), í 5. umfari. Talvið eftir lorkaði eg eina helst vinnandi støðu burtur og megnaði einans javnleik ímóti pólska IM'aranum, Piotr Dukaczewski (2310). Hóast hann er tarnaður av blindni, er póllendingurin sera virkin eisini í vanligum kappingum. Talvið gekk fyri seg á tann hátt, at vit fluttu leikirnar fyri bæði hvítan og svartan á hvør sínum talvborði (einum blindatalvborði og einum vanligum) og søgdu leikirnar hart, tá ið vit fluttu. Vit trýstu á somu klokku, men mótstøðumaðurin hevði eitt headsett sett til klokkuna, so hann kann hoyra tíðina. Hugaligt var at síggja, at blindni ikki er ein forðing fyri at taka lut í altjóða kappingum á jøvnum føti við aðrar telvarar.

Í 7. umfari fekk eg endiliga triðja sigurin til høldar. Hann kom ímóti fransmanni við 2290 í rating. Andrias tapti hetta umfarið, men mótstøðumaðurin hevði so eisini 2265 í rating. Støðan eftir 7 umfør var tann, at vit báðir lógu hampiliga væl fyri í mun til styrkitølini: Helgi við 5/7 og Andrias við 3½.

Í 8. umfari slapp eg fyri aðru ferð í kappingini at telva á live-borðunum, hesaferð ímóti GM Sebastian Maze (2577). Talvið var eitt dømi um, hvussu stórur fyrimunur tað er at hava eitt breitt byrjanarrepertoire. Eg hevði sæð, at mótstøðumaðurin telvar sera nógvar ymsar byrjanir og hevði fyrireikað meg upp á ótalligar variantar av sisilionskum og kongaindiskum, men kortini tók stórmeistarin meg á bóli við einari uppseting, hann ikki hevur nýtt áður. Eg fann ikki rætta svarið ímóti sonevndu Botvinnik-uppsetingini og varð spakuliga kroystur niður ("suffokeraður", av enska orðinum "suffocated", tykist mær sum eitt hóskandi lýsingarorð til

hetta talvið). Andrias syrgdi tó fyri, at vit enn kundu røkka málinum um at einki umfar tapa 2-0 við einum góðum javnleiki ímóti íslendskum 2200-manni.

Í 9. og seinasta umfari telvaði Andrias fyri 8. ferð í kappingini ímóti hægrirataðum mótstøðumanni. Hesaferð var tó lítið at gera ímóti einum vælleikandi íslendingi við ratingtali áljóðandi 2180. Sjálvur fór eg all-in í einari roynd at sleppa undan einum samlaðum ratingmissi:

## Ziska,Helgi Dam (2456) – Perez,Flavio (2269)



Mótstøðumaðurin hevði júst leikt ...Be7-c5, og eg sá ein møguleika at fara eftir svarta konginum: **29.Qg5!?** Objektivt sæð eigur hetta ikki at geva meira enn javnleik, men tað er ein fín praktisk roynd. **29...Bxd4 30.Qh5** Diagram



[Endiliga ikki 30.Qxh4, tí svartur hevur tá ávísar møguleikar við ...Bxf2+.] **30...Rc8** [Her kundi svartur leikt 30...g6, og hvítur hevur ikki meira enn ævigt skák eftir 31.Bxg6 Bxf2+

32.Kg2 fxg6 33.Qxg6+] **31.Ng5** Við hóttanini Bh7+ og mát á f7. **31...Qa7** Diagram



Einasti leikur; svartur noyðist at verja f7. **32.Bh7+** [Eg roknaði eina løtu upp á 32.Nxe6, við hóttanini Fh7#, men tað gevur ikki meira enn javnleik: 32...g6! *(32...fxe6 33.Rxc8+ Bxc8 34.Qe8#* var poengið*)* 33.Qh6 fxe6 34.Qxg6+ Qg7 35.Rxc8+ Bxc8 36.Qe8+ =] **32...Kf8 33.Nxe6+!** Diagram



**33...Ke7** [33...fxe6? tapir: 34.Rf3+ Ke7 35.Rf7+ Kd8 36.Qg5+ Ke8 37.Rxa7] **34.Qg5+** Diagram



**34...Kxe6??** Endiliga fer hann skeivur! [34...Kd7 var neyðugt. Hvítur hevur tó í minsta lagi ævigt skák við t.d. 35.Rc7+!? Rxc7 36.Qd8+ Kc6 37.Qd6+ Kb7 38.Qxc7+ Ka8 39.Qd8+] **35.Bf5+ Kxe5 36.Bxc8+** Við skáki! **36...Kd6 37.Qd8+ Ke5 38.Qg5+** Fyri at spara tíð á klokkuni; vit vóru báðir í svárari tíðarneyð her. **38...Kd6 39.Qd8+ Ke5 40.Rc7!** Diagram



Leikur 40! Eg var ikki sørt fegin at fáa hesa støðuna og ½ tíma eyka á klokkuna eftir at hava verið illa sperdur í tíðarneyðini. (Mótstøðumaðurin segði annars, at tað var henda leikin, hann hevði yvirsæð, tá hann leikti ...Kxe6 ístaðin fyri ...Kd7.) **40...Bxf2+ 41.Kg2 Qb6?** Støðan var tapt, men nú er tvungið mát. Endin er vakur: **42.Qg5+ Kd4 43.Qf4+ Kd3 44.Bf5+ Ke2 45.Qf3+** Diagram



Og svartur gavst. Eg hevði ætlað 45...Kd2 46.Qc3+ Kd1 47.Qc1+ Ke2 48.Qb2+ Ke1 49.Rc1#

**1–0**

Endaliga úrslitið gjørdist, at Helgi fekk 6/9 og stendur í stað í rating, og Andrias fekk 4/9 og fer 13 ratingstig upp. GM Fabiano Caruana vann kappingina við 7½ stigi, ½ stig framman fyri sjey telvarar, sum deildu annaðplássið. GM Hou Yifan var líka við at koppa ratingfavorittinum í síðsta umfari og fara við øllum, men italiumaðurin slapp við skrekkinum. 19 ára gamli stórmeistarin vann sær 6 ratingstig og tók seg upp á 6. pláss í heiminum.